# Tvíburar við toppkarakterum

**Hósdagin var prógvhandan á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum, har 164 næmingar fingu prógv. 18 ára gomlu tvíburarnir Ásbjørn og Jóhan Viderø Gunnarsson fingu báðir toppkarakterir**

PRÓVTØKA
*Snorri Brend*
*snorri@sosialurin.fo*



*Tvíburabrøðurnir Ásbjørn og Jóhan Viderø Gunnarsson fingu báðir toppkarakterir í Studentaskúlanum í Hoydølum*

Próvtøkurnar á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði í Hoydølum eru nú lidnar, og hósdagin var prógvhandan í Ítróttarhøllini á Hálsi, har rektarin, Mads A. Winther, helt røðu, og limir úr sangkóri í Hoydølum luttóku.

Tað heldur sjaldsama hendan dagin var, at tvíburarnir Ásbjørn og Johan fingu toppkarakter við bert 0,1 karakteri á muni. Ásbjørn Viderø Gunnarsson fekk 10,6 í miðal og harvið eisini besta miðalkarakterin í Hoydølum í ár, meðan tvíburabeiggin, Jóhan, fekk 10,5 í miðal.

– Vit báðir eru sjálvandi sera væl nøgdir við hetta. Eisini gleðast vit um, at próvtøkan nú er liðug, og at alt gekk so væl, siga teir.

Teir halda báðir, at tað hevur verið ein fyrimunur at hava havt hvønn annan at gera skúlating saman við, og hava teir kunnað samstarvað.

Ásbjørn og Jóhan gingu fyrst í Adventistaskúlanum í 7 ár, síðan tóku teir 8. og 9. flokk í Kommunuskúlan og fóru so beinleiðis í Studentaskúlan.

Umframt skúlan, eru báðir við 1. deldarhópinum hjá B36, og brúka teir nógva tíð til venjing og dystir. Skúlin og fótbólturin fara soleiðis við nógvari tíð, men við síðuna av ganga teir eisini við bløðum í grannalagnum á Ternuryggi fyri Prentmiðstøðina.

– Nú fara vit at finna okkum okkurt arbeiði, áðrenn vit fara víðari til hægri lestur, siga Ásbjørn og Jóhan.

Hvat teir fara at lesa til, hava teir tó ikki tikið støðu til enn.

# Edvard Heen nýggjur varastjóri á Tryggingini

Tryggingarfelagið Føroyar hevur í eina tíð arbeitt við at seta á stovn nýtt lívs- og pensiónstryggingarfelag fyri at kunna taka kappingina upp á hesum økinum.

Í hesum sambandi eru leiðslubroytingar framdar í felagnum. Mortan Poulsen skal nú burturav arbeiða við at seta á stovn eitt nýtt lívs- og pensiónstryggingarfelag, og samstundis er Edvard Heen settur sum varastjóri í tryggingarfelagnum at byrja 1. august 2006. Tá lívs- og pensiónsfelagið er stovnað, verður Mortan Poulsen stjóri í tí felagnum.

Edvard Heen hevur fyri tíð síðani starvast sum ráðgevi hjá Tryggingarfelagnum og eisini verið nevndarlimur hjá Tryggingini í Smyril Line. Eisini hevur hann drúgvar leiðsluroyndir bæði í Føroyum og uttanlanda, og kemur nú frá einum starvi sum leiðari fyri privatøkið í Føroya Banka. ”Vit fegnast um at hava knýtt Edvard at felagnum, har hann við sínum leiðsluroyndum kann vera við at menna felagið, nú stórar uppgávur standa fyri framman,” sigur Gunnar í Liða, forstjóri. Edvard skal taka sær av dagligu leiðsluni av tryggingarvirkseminum.

”Samstundis vita vit, at stórir møguleikar eru innan lívs- og pensiónsøkið, og tí hevur felagið í eina tíð arbeitt við at seta á stovn nýtt lívs- og pensiónstryggingarfelag,” sigur Gunnar í Liða, forstjóri. Mortan Poulsen hevur, áðrenn hann kom til Tryggingarfelagið, havt drúgvar royndir innan lívstryggingarøkið, har hann í 19 ár starvaðist á Føroya Lívstrygging, harav tey seinastu árini sum dagligur leiðari av felagnum, og hevur sostatt holla vitan um hetta virksemið.




*Edvard Heen hevur drúgvar leiðsluroyndir bæði í Føroyum og uttanlands*

## Andlát og jarðarferðir

**Preben Gudmundsson**, ættaður úr **Vági**, búsitandi í **Thisted**, andaðist 21. juni, 53 ára gamal.

**Hans Olsen á Oyrarbakka** andaðist hósdagin á Røktarheiminum á Mørkini, 87 ára gamal.

## Tøkk

Hjartaliga takka vit tykkum, sum hjálptu til á ymiskan hátt, tá kæri pápi, verpápi og abbi okkara

**Øssur Viberg Mortensen**
ættaður av Tvøroyri

so brádliga andaðist í Keypmannahavn 1. juni og varð jarðaður á Tvøroyri.
Tøkk fyri kransar og blómur.
Tøkk til prest fyri troystarrík orð. Tøkk til sangarar, berarar og gravara.
Tøkk til tykkum mongu, ið hjáltpu til í Keypmannahavn.
Harrin signið tykkum øll.

*Familjunnar vegna*
**Cecilia og Laila við familju**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit fyri sýnda samkenslu og hjálpsemi, tá góði faðir, verfaðir og abbi okkara

**Erik Johannesen**
Vestmanna

lá sjúkur, doyði og varð jarðaður.

Tøkk til tykkum á Eldrasambýlinum, ið vóru um hann, og fyri ta umsorgan, ið hann og vit fingu.
Tøkk til Agnar Nielsen og Ingu Poulsen Dam prest, fyri góð og troystarrík orð í Eldrasambýlinum og í kirkjuni.
Tøkk til sangarar, berarar, kirkjutænarar og gravarar.
Tøkk til øll tykkum, fyri ta stóru hjálp, ið tit á ymiskan hátt veittu okkum við jarðarferðini og ervinum.
Tøkk fyri blómur, kransar, heilsanir og peningagávu til Eldrasambýlið.
Tøkk til tykkum mongu, ið fylgdu honum til hansara seinasta hvíldarstað her á fold
Hjartans tøkk øll somul.

*Familjunnar vegna*
**Joen Pauli, Jørgen, Emly og John**

Sosialurin
www.sosialurin.fo